Báturin er nýbygdur og kann dykka. 4.000 kr.
*Tlf. 321969 eftir kl. 18*

**HPI MONSTERTRUCK**
Við Nitromotori 3.5 ccm 2.1 HK. Bilurin er super og hevur 2 gear + bakgear. Søluprísur 3.500 kr.
*tlf. 214163*

## Lutaseðlar

**VINNINGARNIR**
á lutaseðlasøluni hjá fyrsta flokki í Miðvágs- Sandavágs Skúla fullu soleiðis:
1. vinningur Hvítur seðil nr. 75
2. vinningur Reyður seðil nr. 32263
3. vinningur Gulur seðil nr. 63
4. vinningur Bláur seðil nr. 23
5. vinningur Grønur seðil nr. 4
6. vinningur Bláur seðil nr. 61
7. vinningur Gulur seðil nr. 36878
8. vinningur Gulur seðil nr 36894.

Allir vinningarnir eru heintaðir.
Vit takka hjartaliga fyri tann góða stuðulin.
*1. flokkur í Miðvágs- Sandavágs Skúla*

## Matur

**GOTT NEYTAKJØT**
Neytafjórðingar til sølu. Sent verður kring landið. Framfjórðingar 24 kr. kg. og afturfjórðingar 26. kr. kg. Ring og bílegg á
*tlf. 451222 ella 253168*

**KROV TIL SØLU**
Neytafjóðringar kunnu bíleggjast.
*Tlf. 218101 - Velbastað*

## Pløgg

**KONFIRMATIÓNSKJÓLI**
langur, við brokadustoffi við ermar og bringustykki, offwhite og egið design, str. 36-38. Skógvar við tunnum reimum str. 38.
*Tlf. 322950/506927*

**KONFIRMATIÓNSKJÓLI**
Lilly konfirmatiónskjóli við jakka, str. 38 til sølu fyri 600 kr.
*Tlf. 424309*

**KONFIRMATIÓNSKJÓLI**
str. 38 við tilhoyri (jakki og sandalir) til sølu. Kann seljast hvør sær!
*Tlf. 444845/507673*

**KONFIRMATIÓNSKJÓLI**
við jakka str. 34 Lilly model til sølu.
*Tlf. 226593*

**BÚNI HJÁ LJÓSINUM**
Búni hjá fimleikafelagnum Ljósinum, str. medium, til sølu fyri 250 kr. Nýprísur 550,-
*Tlf. 212206/317560*

**KONFIRMATIÓNSKLÆÐIR**
Lilly - stuttur. Toppur, niðurdeilur, undirskjúrt og turriklæði, støðd 38.
*Tlf. 741744 ella 441744*

**KONFIRMATIÓNSKJÓLI**
Konfirmatiónskjóli við jakka bíliga til sølu. (langur,einkultur,str.36, lilly model).
*Tlf. 212803*

**VESTUR TIL DRONG YNSKIST!**
Vestur til drong 7-8 ár ynskist til føroyska búnan, helst reyður.
*Tlf. 224946 eftir kl. 15*

**BRÚDLEYPSKLÆÐIR TIL DRONG**
str. 134-140, svartur velafrakki, svartar buksur, gráur silkivestur við mynstri og cravat. Einans 500 kr.
*Tlf. 322213 eftir kl. 17*

**BRÚÐARGENTUKJÓLI TIL SØLU**
kjóli, std. 4 ár, úr rásilki við gullbroderí. Tilhoyr: Gullskógvar, taska, hárprýði, einans 500 kr.
*tlf. 322213 eftir kl. 17*

## Samband

**EINLIG MAMMA**
søkir samband við trúgvandi mann. Aldur 30-40 ár, børn eingin hindring. Send eina mynd við. 100% tagnarskyldа. Skriva til Sosialin, box 76, 110 Tórshavn.
*Bill.mrk. 2011*

## Sjavs

**SJAVSKAPPING**
verður í Felagslonini í Fuglafirði, fríggjakvøldið 4. februar kl. 19.
*Eldrafelagið Borgin*

**FRÁ TÓRSHØLL**
Sjavskapping verður týsdagin 1. febr. kl. 19. Øll eru vælkomin.
*Tórshøll*

**HALDÓRSVÍKAR AVHALDSFELAG**
Sjavskapping verður sunnudagin tann 30. januar kl. 16.00.
*Nevndin*

**SJAVS**
Sjavskapping verður sunnudagin kl. 16.00.
*NSÍ*

## Súkklur

**HONDA X8RS**
til sølu um hóskandi boð fæst. Árg. 2002, km uml. 8000. Sær gott útog koyrir væl. Ring og fá meira at vita á
*tlf. 504446/316895*

**BARNAHJÓLHESTAR**
Tríggjar tvey-hjólaðar barnasúkklur (100 kr/stk) og ein DBS-cross súkkla (200 kr.) til sølu.
*tlf. 441893*

**DAMUSÚKKLA TIL SØLU**
Ein 2 ára gomul damusúkkla til sølu, sær út sum nýggj og hevur 7 gear.
*Ring 243356 eftí´r kl.16.00*

**HONDA X8RS TIL SØLU**
í góðum mekaniskum standi. Er frá mars 2003. Koyrt 7800 km. Kavaketur fylgja við. Kr. 14.000
*Tlf. 224069*

**TIL SØLU**
PGO Komet, er spildurnýggj við einari bagagubox, hevur bara koyrt 130 km, er 3 mðr. gomul, 14.000 kr.
*Tlf. 252829*

## Teldur

**FARTELDA TIL SØLU**
Toshiba windows XP 2002 intel pentium 4, mobile cpu 1.90GHz, 512 RAM, 40 Gigabyte harddisk, CD brennara, DVD avspælara, Taska, netkort + separat mús fylgja við, 11 mánaðar gomul. Kr. 7.500 sí www.gottkeyp.com, /privatlýsingar
*Ring tel. 219886 E-post: meinhardt@post.olivant.fo*

**DVD SPÆLARI**
Akai dvd spælari til sølu fyri 1500 kr. Nýprísur 6.000 kr.
*Tlf. 274545 eftir kl. 15*

**TIL SØLU**
19" SAMTRON skermur til sølu kr 1500,-
*Tlf. 271982*

**TIL SØLU**
ISDN Moden 350 kr. Telduspøl: FIFA 2001 150 kr. FIFA 2002 150 kr. Total Club Manager 2003 150 kr.
*Tlf. 222610*

**TELDA TIL SØLU**
2500+ MHz AMD preocessari, 512 MB DDR Ram, 160 GB harddiskur, Radeon 9000 family skermkort, CD-R-RW brennari, 17" skermur, LAN 100 Mbit, tráleyst Internet kort, flott lýsandi kabinett. Selist samlað fyri 8.000 kr.
*Tlf. 250297/319604, Hjalti*

**HEVUR NAKAR**
eitt Saga spæl at selja mær?
*Tlf. 210560*

**X-BOX**
frá 2004 við 2 joystikkum og 4 spølum til sølu fyir 1700,-
*Tlf. 318415/218415*

## Tónleikur

**KLAVER TIL SØLU**
Eitt lítið brúkt Wurlitzer klaver til sølu.
*Tlf. 310404/510404*

**ROLAND KEYBOARD**
c. 180, 2 ára gamalt, nýprísur 8.000,- selist fyri 5.000 kr.
*Tlf. 444534*

**MEGAKRAFTIGUR BASSHÁTALARI**
Til bilanlegg til sølu fyri kvartan prís. Hann er nóg illa tilkoyrdur. Merki er JBL
*Tlf. 503074*

**STEREOANLEGG**
Við plátuspælara bíliga til sølu.
*Tlf. 503074*

**HEVUR NAKAR**
eitt trummusett, ella partar av einum, sum ikki verður brúkt longur, vil eg fegin frætta nærri.
*Tlf. 314567*

**TRUMMUSPÆLARI**
Trummuspælari søkist til bólk í Eysturoynni, skjótast gjørligt.
*Ring og hoyr nærri á tlf: 261948 & 441548*

**TRUMMUSETT**
Pearl Target, sum nýtt, til sølu. Ring til Flóvin
*tlf. 253167 ella 371844*

**BLÁUR EL-GUITARI**
Fender telecaster thinline til sølu. Prísuppskot kr. 6.000,- húsi fylgir við.
*Tlf. 322241 ella 271935*

## Ymiskt

**FØSTULÁVINTSVEITSLA**
og tunnusláttur verður leygardagin 4. februar. Tekningarlistin til veitslúna og tunnusláing liggur á Óla-fløtti til tórsdagin 3. feb. kl. 18.00. Gott skemt verður á veitsluni, Sólva og Bergmenn spæla til dansin aftaná.
*Føstulávintsnevndin í Sumba*

**GÁVUKORT**
ið er ein ferð fyri tvey, ið einum av skipunum hjá Skipafelagnum er til sølu.
*Tlf. 317921*

**TIL SØLU**
4 termorútar til sølu. Mát: 197,6 x 173,6 x 2,2 cm Prísur 500,- kr.
*Tlf. 215698*

**SEYÐAHUNDAKAPPING Á VIÐAREIÐI**
5. februar 2005. Kappingin verður í klassa 1, klassa 2 og klassa 3. Í hesum sambandi hevur Hotel Norð eisini tilboð í samband við gisting. Síðsta freist at tekna seg er mikudagin 2. februar. Áhugað kunnu ringja á tlf. 756787 ímillum kl. 17 og 22. Gisting á Hotel Norð tlf. 451244 ella 217020.
*Tlf. 451244/217020*

**ÆTLA TIT AT FLYTA TIL DK?**
Vit fara til Danmarkar við flytigóðsi ca 20. februar. Ring og fá eitt gott tilboð.
*Vest-Trans tlf. 227050 fax. 317051*

**OLJUTANGI TIL SØLU**
Oljutangi, tekur 1200 l. prísur 500,-
*Tlf. 319412/272805*

**VIDEOKAMERA**
Sony mini-dv handycam til sølu fyri kr. 3.000,- 3 mðr. gamalt.
*Tlf. 317034*

**FØSTULÁVINTSVEITSLAN**
hjá VÍF verður í ítróttarhøllini í Vestmanna leygardagin 5. februar kl. 19.00. Heitur matur verður til døgurða. Meðan borhaldið er, verður skipað fyri undirhaldi. Aftaná borðhaldið spæla »Lagamenn« úr Hvalba til dans. Atgongumerki á 200 kr eru at fáa á Shellstøðini og hjá Sigurd. Atgongumerki er samstundis lutaseðil til ferð fyri tvey til Danmarkar og aftur við Atlantsflog. Sølan av atgongumerkjum steðgar hósdagin 3. februar kl. 18.00.
*VÍF*

**BRILLUR BURTURMISTAR**
Tann, sum fyrrapartin í mánaðinum fann einar brillur í mynstrutum húsa, úti á Leitisveg, á leið við húsini hjá Allan Poulsen, vinarliga sig mær frá á
*tlf. 447145*

**VINDEYGU TIL SØLU**
2 vindeygu b. 140 x 100 og b. 140 x 130 til sølu fyri 500 kr. stk. – termorútar.
*Tlf. 227853*

**BILANLEGG**
2 sett hátalarar, 1 sett á 250 w og 1 sett á 150 w og ein forsterkari, alt er Pioneer til sølu fyri 3.000,-
*Tlf. 256944 ella 448340*

**BILANLEGG TIL SØLU**
Pioneer Deh-P6500 við livandi myndum á skerminum og trimum forsterkara útgangum til sølu fyri 3000 kr. Nærum óbrúkt.
*Tlf. 213067*

**STUÐULSKONSERT**
verður í Glæmuni í Kvívík leygarkvøldið 29. januar við Magna Christiansen og Kirkjukórinum í Vestmanna, hævi verður at keypa lutaseðlar áðrenn konsertina. Drigið verður á konsertini, høvuðsvinningur er ein vikuskiftisbillet. Børn bert atgongd saman við vaksnum.
*KFUM-Skótarnir í Kvívík*

**ER TÚ ÍMILLUM 50-70 ÁR Í TÓRSHAVN**
Og hevur áhuga at hugna tær í góðum anda vi stokkum + te, kaffimunn uml. tvær ferð um mán. Tú kanskt ringja á
*Tlf. 582990*

**TRAPPA YNSKIST**
Innandurða trappa ynskist. H. 240 cm.
*Tlf. 457178 ella 222640*

**AMATØR-RADIO ÚTGERÐ**
Sommerkamp SSB Transceiver FT 250, BW Antenna Tuner Model VS 300 A, DAIWA Elecronic Keyer, hátalari, SWR-meter model TTS, tvey skeiðhefti + morsubond til sølu fyri 4.000 kr.
*Tlf. 441893*

**HJÁLHESTAHJÁLMAR**
Tveir súkkluhjálmar (Atlas og Winther) til sølu fyri 100 kr. fyri hvønn
*Tlf. 441893*

**FLAMINGUPLÁTUR**
ÁTTA FLAMINGIOPLÁTUR (3000X1000X50) MM3. Vælegnaðar til flótandi gólv, til sølu fyri 400 kr.
*Tlf. 441893*

**KASSATÓL**
Casio, lítið nýtt, prísuppskot: 5.000 kr.
*Tlf. 333014 ella 226161*

**DVD TIL SØLU**
Panasonic dvd afspælari av besta kvaliteti nýprísur uml. 3800 kr nú 1500 kr við dvd filmun.
*Tlf. 220405*

**TIL SØLU**
Nógvir góðir vhs filmar orginalir.
*Tlf. 220405*

**NÚ FER AT NÆRKAST**
Vit fara at hava páskareggja tombola við 600 páskareggum í Glæmuni í Kvívík sunnudagin 27. februar kl. 16.00. Øll eru vælkomin.
*KFUM-Skótarnir í Kvívík*

**EIGUR NAKAR**
3 atgongumerkir til Fólk og Dólgar at selja mær, so vinarliga ring
*tlf. 222308*

**HUGNAKVØLD Í »SKÁLANUM«**
í Klaksvík. Leygarkvøldið 5. februar kl. 20 skipar stuðulsfelagið Dragin fyri árliga hugnakvøldinum við borðhaldi, sangi og dansi í Skálanum. Frá kl. 23 verður dansur, har bólkurin »Flúrar« úr Havn spælir. Tilmelding til borðhaldið í seinasta lagi hósdagin 3. februar á tlf. 456661 og 456282.
*Stuðulsfelagið Dragin*

**VHS FILMSAMLING TIL SØLU**
fyri 700,- kr.
*E-mail: tof82@yahoo.com*

**TIL SØLU**
Video kamera av merkinum Sony, video8, ongantíð brúkt, sum spildurnýtt, við tasku. Einans 1.500,-
*Tlf. 252829*

**NÝTT DIGITAL KAMERA**
Finepix F402 við 16MB korti og software til sølu fyri kr. 1900,- Nýprísur, sí pricerunner.dk
*Tlf. 322241 ella 271935*

**ÁRSVEITSLAN**
hjá Hósvíkar Róðrarfelag og Bygdarfelagnum Varðanum. Ársveitslan verður í bygdarhúsinum leygarkvøldið 12. februar kl. 19.30. Allir hósvíkingar úti og heima eru vælkomnir. Veitslan kostar 180 kr. Seinasta freist at keypa sær atgongumerki er mánakvøldið 7. februar kl. 22.00 í handlinum hjá Jóannesi. Borðreitt verður við feskari súpan, lambskjøti og oman ís við frukt. Góður dansur og skemt.
*Hósvíkar Róðrarfelag og Bygdarfelagið Varðin*

# Braquet í upptøkuhølinum



*Braquet er nú farið undir upptøkurnar til nýggja fløgu*

UPPTØKA
*tíðindaskriv*

Braquet, andaligi rokkbólkurin úr Eysturoynni, sum tey flestu munnu minnast frá Prix Føroyum 2003, hava nógv spennandi í umbúna. Teir vóru millum hinar 24 hepnu bólkarnar, ið herfyri sluppu gjøgnum náláreygað til luttøku í Prix Føroyum 2005. Teir kappast í seinasta umfari, 5. mars, móti Terja Rasmussen og Kristleifi Zachariassen, millum øðrum.

Men hetta er ikki tað einasta, ið upptekur Braquet fyri tíðina. Í seinastu viku varð farið undir upptøkurnar til eina fløgu, ið eftir ætlan skal koma út til Prix Føroyar finaluna. Flestum kunnugt, so er Prix'ið ein serstakliga góður sýnisgluggi uttaneftir fyri føroyskan tónleik. Skarin av áhugaðum útlendingum, arbeiðandi á ein ella annan hátt innan tónleikavinnuna uttanlands, ið eru áhugaðir í Prixnum, veksur fyri hvørja ferð. Braquet ætla sær við útgávuni undir eitt miðvíst arbeiði, at koma út í heim við teirra tónleiki og verður Prix finalan, ella Atlantic Music Event, startskotið. Fløgan verður upptikin í Kris' Stuff Studio í Havn, við Kristoffuri Mørkøre handan knøttarnar sum produsari. Kristoffur skal eisini ljóðblanda fløguna. Manningin í Braquet er Andrias Højgaard, sang, Arni Zachariassen, gittar, Leivur Vitalis, bass og Jóhan á Lakjuni, trummur.

# 50. framsýningin í Ribarhús

**Nú um dagarnar hava vit framsýning, sum er tann 50. í røðini og er henda framsýning við Heðini Kambsdal**

FRAMSÝNING
*tíðindaskriv*

Fyrsta framsýning í Ribarhús var í juni 2001, og tá varð væntað, at hølið kom at standa tømt ein stóran part av árinum. Men, sum orðatakið sigur »livst so spyrt«, tað hevur ongantíð staðið á at fingi útstillara, heldur hevur tað verið soleiðis, at álmanakkin hevur verið fyltur upp og bíðiróðin hevur verið long. So ikki kann sigast annað enn, at tørvur var á einum framsýningarhøli.

Hyggja vit afturá, so síggja vit at helvt um helvt vóru av kvinnur og menn, ið nýttu møguleikan at stilla út. 40% av teimum vóru undir 35 ár og av hesum vóru 75% kvinnur. Áhugaverd tøl.

Í hesum sambandi vilja vit steðga á við hesa framsýningina og bjóða øllum, ið hava áhuga, til eitt kvøld við tónleiki, røðum, skemti og einum kaffimunni. Luttøka verður við Lenu og Niclas og at røða koma Lena L. Mohr, blaðstjóri og Jústines Eidesgaard, rithøvundur, at røða ávikavist um »List sum samskiftið« og »Hvat er list«. Eisini kemur Heri Simonsen at viðgera listina frá tí skemtunarliga horninum.

Tiltakið verður í Ribarhús týskvøldið 1. febr. 05 kl.19.00.